# Kjak



Fríðálvur Jensen

## SALT er eitt mentanarligt kraftlop!

*- og so fingu vit eisini eitt tekin um, hvussu mentanarliga fatanin og viljin er*

Eg havi ikki førleikan at meta um, um verandi bygningur kann nýtast og hvørjar ábøtur skulu til, men eri ómetaliga fegin um tað avgerð politiski myndugleikin hevur tikið – eitt satt mentanarligt kraftlop!

Havi fylgt eitt sindur við í kjakinum, um tað yvirhøvur skal loysa seg at fara undir slíkt og um ein slík verkætlan hevur lív lagað – o.s.fr.

Jú, tað er ongin ivi um, sum eg havi ført fram í fleiri umførum, at tað politiskt og hugburðsliga verður skonkt einari slíkari og øðrum ætlunum vilja og pening, setir nakað á skrá og skapar lív og vónir – tað er tað mentanini tørvar!

Onkur hevur borið fram, at skal ein nú noyðast at ferðast alla longu leiðina suður í Suðuroynna fyri at taka lut og annað – er leiðin serliga long, tá ein nú kann fara við familjuna og øðrum fyri at njóta ta betri tænastuna, sum ein slíkur mentanardepil fer at bjóða?

Tað er í lagi, at vit seta kritiska eygað á tað, sum fer fram, men eitt kunnu vit væl semjast um, og tað er, at tað er brúk fyri júst hesum, at vit stimbra undir mentanina og geva henni góðar karmar – tað er tað, vit eru vitni til!

Fyri at endurtaka meg sjálvan, so er tað júst mentanin, sum stendur eftir, tá nógv annað fellur, so her er ongin ivi í mínum hugaheim, at politiski myndugleikin hevur torað at taka eina avgerð, sum fer at stimbra undir mentanina í Suðuroynni og okkum ØLLUM at frama!

Tað er IKKI brúk fyri døprum og tyngjandi útsagnum í slíkum, sum hesum, tí eg eri ikki í iva um, at her fer nakað gott og uppbyggjandi at síggjast – lat okkum fegnast um tað!

Sum eg havi ført fram fyrr, so er hetta økið tengt at, hvussu vit vilja stilla okkum mótvegis mentanini, og um tað nú er neyðugt við slíkum íløgum, men eg eri onga løtu í iva um, at ALLIR suðringar og onnur fegnast um, at nú fer okkurt at síggjast aftur – tað hevur sanniliga eisini týdning fyri trivnaðin og annað.

Tað er eisini fantastiskt at hoyra, at Klaksvíkar Kommuna ger nakað við mentanina í Norðoyggjum.

Tónleika- og mentanarliga eri eg ómetaliga fegin og takksamur!



Edva Jacobsen

## Barnapsykiatri má og skal raðfestast høgt

Tað kann ikki góðtakast í einum værferðarsamfelag, at børn bíða upp til 2 ár, og kanska longur, fyri at fáa eina sjúkustaðfesting.

#### Bíðitíðin má niður

Tað er sera týdningarmikið, at bíðitíðirnar eru so mikið stuttar, at børnini skjótast til ber fáa eina "diagnosu" og harvið beinanvegin fáa rætta viðgerð.

Hetta er sera umráðandi fyri barnið sjálvt og alla familjuna, sum er um barnið. Um tað gongur ov long tíð til ein sjúka verður staðfest, kann menningin av barninum steðga upp, og í ringasta føri fær barnið afturstig í bíðitíðini.

#### Barnapsykiatri má fáa betri umstøður

Tann umberingin, at vit ikki eru komin longur í Føroyum, tí tað eru so nógv í okkara grannalonum, sum hava so stóran tørv á barnapsykiatri, hon heldur ikki.

Vit mugu taka hond um okkara børn og arbeiða hart fyri at barnapsykiatri fær góðar umstøður at virka undir. Tað má vera okkara mál, um vit framhaldandi skulu kalla okkum eitt vælferðarsamfelag fyri øll.

Hettar er ein av orsøkunum til at eg atkvøddi NEI til Salt-projekt.

Ítróttarsosialurin
– vit eru har tað hendir





**Helgi Abrahamsen**
*løgtingsmaður*

## Tjóðveldi biður Kaj Leo hjálpa sær at loysa

**Tú veitst ikki um tú skalt gráta ella flenna, tí hetta er hóast alt eitt álvarsmál.**

Á skránni fyri tingfundin fríggjadagin stóð eitt uppskot frá Tjóðveldi, um at loysa úr ríkisfelagsskapinum. Málið hevur ligið í uttanlandsnevndini í eina tíð, men nú varð skotið upp at krevja tað úr aftur nevndini, soleiðis at tað kundi verða avgreitt.

Eg má rósa teimum tingfólkunum, sum sóu støðuna ov álvarsama til at taka undir við uppskotinum, og tí vóru við til at fella tað.

#### Meðan fíggjarnevndin leitar eftir smápengum

Seinastu vikurnar hevur fíggjarnevndin hjá løgtinginum arbeitt dúgliga við karmunum fyri 2012. Toganin hevur verið øðilig, tí onkur vil hava eina millión flutta henda vegin, meðan onkur annar vil hava tvær milliónir ein annan veg. Eisini hevur spurningurin verið frammi, um hvussu býtið skal vera millum sparingar og hækkað avgjøld.

Áðrenn løgtingið fekk uppskotið til viðgerðar, vóru eisini harðar samráðingar í landsstýrinum um sama mál, og tað endaði við, at samgongan slitnaði.

Í tølum eru ósemjurnar kanska ikki so stórar, men roknistykkið má so ella so ganga upp.

#### Loysing

Mitt í øllum hesum rokinum, kemur eitt uppskot klaskandi inn á tingborð um at loysa Føroyar úr ríkisfelagsskapinum. Nú tosa vit ikki bara um nakrar fáar milliónir henda veg ella handa veg, ella onkra lítla skattahækking, nei nú stendur ein heil milliard uppá spæl. Góðar 600 mió. krónur í blokkstuðli umframt aðrir ágóðar frá ríkinum skulu strikast av fíggjarlógini við einum pennastroki. Nú ber knappliga alt til.

Og har sótu vit í løgtinginum á miðari nátt og kjakaðust um, hvør skuldi gjalda fyri barnsins fyrsta sjúkradag. Og úrslitið gjørdist, at arbeiðsgevararnir fingu rokningina, tí sagt varð, at landskassin hevði ikki ráð at gjalda - sami landskassi, sum somu fólk siga, hevur ráð at missa yvir 600 mió. krónur um árið! Hvar er logikkurin?

Hóskandi kundi verið at spurt, um ætlanin er at spara allar 600 milliónirnar, ella um føroyingar skulu gjalda 600 milliónir meira í skatti? Ella skulu kanska 300 milliónir finnast við sparingum og hinar 300 við skatti? - Fólk mugu vera blivin óð í høvdinum.

#### Soðið tynnist

Ein troyst í øllum hesum er tó, at føroyingar hava fingið eyguni upp fyri fullveldisvandanum, og tí er undirtøkan fallandi.

Fullveldislandsstýrið frá 1998 hevði hóast alt eina ávísa styrki. Meirilutin á løgtingi fylgdi teirra ætlan, og embætisfólkini spældu eisini væl við. Nú má harafturímóti sigast, at Tjóðveldi er munandi viknað, tí nú skýtur flokkurin upp at fáa løgtingið at heita á ein sambandsløgmann um at fyrireika loysingina, so har kunnu ikki vera nógv skot eftir í byrsuni. Skuldi tað hent, at løgtingið samtykti uppskotið, so hevði tað framvegis verið upp til Kaj Leo Johannesen at gjørt av, hvussu nógva orku hann skuldi lagt í hetta arbeiðið, og kenni eg hann rætt, so hevði loysingin neyvan fingið hægstu raðfesting.